

## Tann fyrsti í 20 ár

Norska skipasmiðjan Sortland hevur skrivað undir sáttmála um at byggja ein verksmiðjutrolara, og hetta er tann fyrsti verksmiðjutrolarin, sum verður bygdur til eitt norskt reiðarí í 20 ár, skrivar Sunnmørsposten. Tað er reiðaríið AS Prestefjord, sum skal hava trolaran, ið skal latast í 2009. Trolarin skal hava 8.100 hesta maskinu og fer at ganga 16 míl. Manningarrúm verða til 34, og trolarin fer at kosta góðar 200 mió. norskar krónur.

# l føroysk hjún

**FAKTA**

### Um Ernu og Njál Djurhuus

- Eru í Noregi kend fyri sítt arbeiði á Fyrlyset - www. frelsesarmeen.no/fyrlyset - í Urtegata í Oslo. Hetta er eitt stað, har millum annað rúsevnismisnýtarar kunnu koma. Arbeiði teirra í Fyrlyset er kent fyri einastandandi blídni og hjálpsemi, og tað er fyri hetta, at tey í dag fáa "Kongens fortjenstmedalje i gull."
- Í august í ár eru tað 45 ár síðani, at tey fluttu til Noregs fyri at fara undir virki teirra innan Frelsunarherin.
- Tey komu til Fyrlyset í 1985. Njál var her fram til 1999, men hevur síðani brúkt nógv av frítíðini til at hjálpa her. Erna helt á fram til 2006 í Fyrlyset. Í dag er Erna leiðari fyri eini samkomu í Fjellhamar, stutt uttan fyri Oslo, meðan Njál arbeiðir við eini nýggjari sangbók til Frelsunarherin í Føroyum.
- Hjúnini Djurhuus hava áður fingið heiðurslønirnar St. Hallvards (2000) og Scheiblers (1999).



*Jan Vincent Johansen helt røðu. Hann hevur staðið á odda fyri arbeiðnum at fáa Kong Harald til at geva føroysku hjúnunum hendan heiðurin. Hann er eisini ein góður vinur hjá Ernu og Njál*



høvdu givið okkum ans, siga Erna og Njál um arbeiði sítt.

### Halda fram í Urtegata

At tey nú hava fingið fleiri heiðurslønir fyri sítt arbeiði, og serliga hendan seinasta, ið er tann hægsta heiðurslønin ein kann fáa í Noregi fyri sítt arbeiði, vísir, at sjálvt um tey bæði treyðugt vilja seta seg sjálvi í andglettin, so eru tað í dag rættuliga nógv í Noregi – bæði høg og serliga lág sum hava bitið merki í hjúnini og teirra virksemi.

– Sum ein av brúkarunum einaferð segði við meg. Um ikki hann og aðrir evnismisnýtarar vóru, so vóru vit arbeiðsleys. Og satt er tað, men tað hevði verið best, um vit sluppu at hava eitt samfelag, sum hevur pláss fyri øllum, sigur Njál.

Um at fáa "kongens fortjenstmedalje i gull" sigur Njál, at ein slíkan heiður er trupult at siga nakað um sjálvur.

– Vit hava gjørt okkara besta. Vit hava við okkum okkara føroysk arv, og millum annað ber tað við sær, at vit ynskja at hjálpa og kunnu ikki lata vera við at gera tað. Tað eru onnur, sum hava skotið okkum upp, so tað er kanska arbeiðsbólkurin sum betur kann siga, hví tey meta, at vit eiga at fáa hendan heiðurin.

Tey viðganga bæði, at arbeiðið til tíðir hevur verið mest álíkt tí vit halda fer fram í frumskóginum. Men hóast krevjandi, so dámar teimum framvegis væl at hjálpa til í Urtegata. Tey eru ikki longur í starvi í Urtegata.

– Men vit kunnu ikki halda okkum burtur. Eg eri í dag og hjálpi til, tá eg kann, og tá eg gerist pensjonistur, so komi eg at vera har enn meir, sigur Njál. Bæði hava framvegis samband við nógv av teimum, sum tey hava hitt og eru koman at kenna gjøgnum tíðina her.

– Eg veit ikki, hvat eg skal siga um heiðurslønina. Eg kenni tað ikki sum um tað er til mín, men at hon er til tað arbeiði vit hava verið við í Urtegata, sigur Erna.